# Frágreiðing frá arbeiðsbólki at gera tilmæli um lønarkarm fyri sáttmálasamráðingarnar á almenna arbeiðsmarknaðinum á heysti 2025

**Arbeiðssetningur:**
Endamálið er at áseta ein felags lønarkarm, sum verður ásettur við støði í hesum viðurskiftum:

1) Lønarvøkstrinum í privata geiranum
2) Onnur viðurskifti, herundir t.d. produktivitetsvøkstur, sum arbeiðsbólkurin metir eru fakliga viðkomandi

Ásannandi, at vit ikki hava neyv tøl fyri eitt nú produktivitetsvøkstrinum í Føroyum, eru partarnir samdir um at áseta karmin, so neyvt og rætt sum til ber, við nevndu viðurskiftum fyri eyga.

Endamálið er at røkka einum støðugum reallønarvøkstri, sum er búskaparliga forsvarligur.

*Allýsingar:*
Felags karmur: Ein prosentpartur av samlaðu lønini verður ásettur. Karmurin í prosentum er at skilja sum samlaða broytingin av lønarsumminum fyri hvørt ár í sáttmálaskeiðinum: broytingar í grundløn, eftirløn, allar viðbøtur, bæði førleikaviðbøtur og viðbøtur fyri ólagaliga arbeiðstíð, umflokkingar, broytingar í starvsaldri o.s.fr.

*Arbeiðsbólkurin:*
Arbeiðsbólkurin verður mannaður við fýra búskaparfrøðingum, tveir tilnevndir av fakfeløgunum, ein av Kommunala arbeiðsgevarafelagnum og ein av Fíggjarmálaráðnum.

Arbeiðsbólkurin skal skjótast møguligt gera eitt tilmæli.

Sum nevnt hava vit ikki neyv tøl fyri eitt nú produktivitetsvøkstrinum í Føroyum, og samráðingarnar á almenna arbeiðsmarknaðinum fyri seinna árið liggja áðrenn samráðingarnar á privata arbeiðsmarknaðinum. Tað hevur eyðsæð við sær, at arbeiðsbólkurin má taka neyðug fyrivarni fyri óvissu.

Arbeiðsbólkurin verður, innan fyri hesar avmarkingar, biðin at gera eina meiting av karmurin so neyvt og rætt sum til ber.

*Arbeiðsbólkurin:*

Fyri arbeiðsgevarar: Djóni Højgaard, FMR, og Hans Kári Vang, KF
Fyri arbeiðstakarar: Jan Otto S. Holm og Flóvin Eidesgaard.

**Tilmæli frá arbeiðsbólkinum:**
Ein samdur arbeiðsbólkur mælir til, at lønarkarmurin verður:

- frá 1. oktober 2025: **3,87%**
- frá 1. oktober 2026: **3,59%**

*Grundgevingar fyri tilmælinum 1. oktober 2025:*
Tilmælið fyri 2025 er grundað á ta vanligu lønarhækkingina á privata arbeiðsmarknaðinum tann 1. mai 2025. At talan er um ta vanligu hækkingina vil siga, at tað er uttan tað serstaka lønarlyftið.

Upprunaliga samráðingarútspælið frá Fíggjarmálaráðnum var 3,30%. Tilmælið innibar eina lækking í mun til privata arbeiðsmarknaðin á 0,57%, vegna hægri almennan enn privatan lønarkarm bæði í 2023 og 2024. Arbeiðsbólkurin metir ikki, at grundgevast kann fyri slíkari lækking til samráðingarnar hesuferð. Orsøkin er, at umstøðurnar rundan um hesar semjur – við drúgvum verkføllum og lønarlyfti bæði hjá tí almenna og tí privata – eru ov serstakar og ógreiðar til, at hesi samráðingarúrslit kunnu brúkast til eina so neyva niðurregulering av almenna lønarkarminum í 2025, sum lagt verður upp til. Hesar semjur vóru so heilt serligar, at mælt verður frá at hyggja aftureftir og í staðin bara frameftir, og áseta almenna lønarkarmin ájavnt við vanliga privata lønarkarmin á 3,87%.

*Grundgevingar fyri tilmælinum 1. oktober 2026:*
Á einum vælvirkandi arbeiðsmarknaði er tað serliga produktiviteturin, sum í síðsta enda setur lønarlagið. Tað vil siga virðið á framleiðsluni í mun til talið av starvsfólki (ella tímatali). Økist produktiviteturin kann arbeiðstakarin sum frálíður samráða seg til eina lønarhækking, sum svarar til økta produktivitetin. Sum frálíður eigur reallønin sostatt at fylgja gongdini í produktivitetinum. Fyri at tryggja reallønina eigur løntakarin eisini at fáa kompensatión fyri tann prísvøksturin sum alla tíðina er í búskapinum.

Almenni arbeiðsmarknaðurin er serstakur, tí framleiðslan verður ikki seld á nøkrum marknaði og arbeiðsmegin verður fíggjað av skattum og avgjøldum. Kapping er tó um arbeiðsmegina og tí má lønin á almenna arbeiðsmarknaðinum fylgja tí á privata arbeiðsmarknaðinum, fyri at kunna fasthalda og tiltrekkja nýggja arbeiðsmegi. Fer lønarlagið á almenna arbeiðsmarknaðinum langt upp um tað sum produktiviteturin klárar at bera, leggur tað trýst á kappingarførið og framleiðsluna í privata geiranum, sum kann viðføra mista framleiðslu og økt arbeiðsloysi.

Arbeiðsbólkurin hevur í sínum tilmæli einans valt at brúka produktivitetsvøksturin og prísvøksturin í sínum tilmæli. Men tað er greitt, at eisini støðan á arbeiðsmarknaðinum hevur týdning fyri lønargongdina. Er arbeiðsloysi í búskapinum stendur arbeiðsgevarin í einari sterkari støðu enn løntakarin, men er hinvegin trot á arbeiðsmegi stendur løntakarin betur. Arbeiðsbólkurin metir tó, at tað, at tað almenna og privata áseta lønarkarmin annaðhvørt ár leggur upp fyri hesum. Tað vil siga, at tilmæli einans snýr seg um hvørja lønargongd, ið arbeiðsbólkurin tjóðarbúskaparliga metir verða hóskandi, meðan sjálv marknaðartillagingin viðvíkjandi útboð og eftirspurningi verður latið upp til samráðingarnar á privata arbeiðsmarknaðinum.

Tilmælið fyri 2026 er grundað á gongdina í produktivitetinum seinastu 5 uppgjørdur árini og prísvøksturin seinastu 3 uppgjørdu árini. Tað vil siga, miðalvøksturin í produktivitetinum árini 2020 - 2024 og miðal árligi prísvøksturin í tíðarskeiðnum august 2022 til august 2025.

| | |
|---|---|
| Miðal produktivitetsvøkstur - 5 ár: | **1,42%** |
| Miðal prísvøkstur - 3 ár: | **2,17%** |
| **Tilsamans:** | **3,59%** |

Orsøkin til, at arbeiðsbólkurin mælir til at brúka 5 ára miðal produktivitetsvøkstur er, at sveiggini í føroyska búskapinum eru so stór. Við at brúka eitt lutfalsliga langt áramál ber til at tryggja ein støðugan lønarvøkstur, sum í væl størri mun stavar frá varandi hækking í produktivitetinum og í væl minni mun stavar frá fyribils sveiggjum í búskapinum. Løntakarin fær nú lut í búskaparvøkstrinum so líðandi yvir eitt longri áramál.

Greitt er, at eitt enn longur áramál kundi tryggjað ein uppaftur støðugari vøkstur. Men hinvegin, so má áramálið tó ikki verða so langt, at arbeiðsmarknaðurin, og búskapurin sum heild, hevur ov leingi um at tillaga seg til broytingar í produktivitetinum. Lønin hevur ein týðandi leiklut í at tryggja, at arbeiðsmegin leitar sær burtur frá teimum vinnum, har produktiviturin er ov lágur og til vinnur har produktiviteturin er størri. Tí má heldur ikki alt ov long tíð ganga til produktivitetsbroytingar ávirka lønina. Arbeiðsbólkurin metir tí, at 5 ár eru hóskandi.

Viðvíkjandi prísvøkstri hevur arbeiðsbólkurin hinvegin valt at brúka 3 ára miðal. Hetta hevur við sær, at príshækkingar í einum einstøkum ári, ávirka lønina í størri mun enn produktivitetshækkingar. Endamálið við hesum er at verja keypiorkuna hjá løntakaranum. Meðan produktivitetshækkingar siga nakað um, hvussu nógv meira hvør løntakari framleiður í miðal, so minkar prísvøkstur beinleiðis um virðið á lønini. Prísvøkstur má tí kompenserast skjótari enn produktivitetsvøkstur. Við tilmælinum verður høgur prísvøkstur í einum einstakum ári, sostatt fult endurgoldin tey komandi trý árini.

*Hagtalsgrundarlag:*
Stórar avmarkingar eru í tøka hagtalsgrundarlagnum innan arbeiðsmarknaðin.

Neyv tøl eru ikki fyri tímaproduktivitet í Føroyum. Arbeiðsbólkurin hevur tí valt at brúka BTÚ í føstum prísum býtt við tal av arbeiðsvirknum, sum mát fyri produktivitet.

Prísvøkstur eru lutfalsligu broytingarnar í brúkaraprístalinum hjá Hagstovuni.

Bólkurin ger vart við, at eingi almenn vísitøl er fyri lønarlagið í almenna ella privata geiranum. Skal lønargongdin í privata geiranum brúkast til reguleringar av almennu lønunum frameftir, eigi hesi tøl at vera framleidd.

**Støðan á arbeiðsmarkninum**
Støðan á arbeiðsmarknaðinum hevur verið heilt serstøk seinastu árini. Tað er týðiligt, at eftirspurningurin eftir arbeiðsmegi støðugt hevur verið nógv størri enn útboðið:

- Arbeiðsloysi hevur ligið heilt niðri á 1% seinastu 6 árini (mynd 3).
- Starvsfólkatalið er vaksi úr 24.000 og upp í 30.000 seinastu 10 árini (mynd 6).
- Talið av starvsfólki uttan bústaðartilknýti er vaksið úr 500 og upp í 2.000 seinastu 10 árini (mynd 8).

Øll tøl benda sostatt á ein arbeiðsmarknað, sum hevur verið undir trýsti seinastu árini – og er tað framvegis.

Men hóast stóra starvsfólkatrotið, so eru ikki stórvegis tekin um lønarglíðing á arbeiðsmarknaðinum. Hetta kemst helst av føroysku siðvenjuni, har lønin í stóran mun fylgir avtalaðu sáttmálalønini. Eisini hevur atgongdin til arbeiðsmegi uttanlands tikið broddin av eftirspurninginum. Her verður serliga hugsað um føroyingar, ið arbeiða uttanlands, útisetar og tað, at landið hevur latið meira upp fyri fremmandari arbeiðsmegi.

Tvinnar høvuðsorsøkir eru til stóra starvsfólkatrotið seinastu árini. Onnur høvuðsorsøkin er tey stóru avlopini í ali- og uppisjóvarvinnuni. Hetta hevur havt við sær ein stóran streym av inntøkum inn í búskapin, sum ikki bara streymar inn í hesar báðar vinnurnar, men eisini inn í almennu kassarnar og sum frálíður eisini inn í alla privatu vinnuna. Stóri peningastreymurin, hevur havt við sær ein stóran eftirspurning eftir arbeiðsmegi, bæði frá tí almenna og privata geiranum. At eisini ferðavinnan hevur rættiliga fótað sær í sama tíðarskeiðið, hevur gjørt eftirspurningin enn størri. Harumframt má eisini skattalættin í 2012, har forskattingin av eftirlønum, hevði við sær ein annan stóran peningastreym inn í búskapin, metast at hava økt eftirspurningin í Føroyum munandi.

Hin høvuðsorsøkin til starvsfólkatrotið er tann, at fyri 15 árum síðan byrjaðu stóru árgangirnir, sum vóru føddir eftir seinna heimsbardaga, at fara av arbeiðsmarknaðinum. Talið av fólki, ið árliga fóru um pensjónsaldurin, var í nógv ár gott 300 árliga. Men síðan 2009 er talið vaksið til 500-600 árliga (mynd 7). Hetta hevur minkað um útboðið av arbeiðsmegi við góðum 200 árliga seinastu 15 árini. Verður hinvegin hugt at talinum av ungum, sum koma inn á arbeiðsmarknaðin, so er talið nú stórt sæð tað sama, sum talið av fólki, sum fara av arbeiðsmarknaðinum. Hetta hevur við sær, at ongin natúrligur vøkstur longur er í føroysku arbeiðsmegini. Allur vøkstur í arbeiðsmegini má tí koma frá útlandinum. Stórur eftirspurningur eftir arbeiðsmegi uttan nakra natúrliga tilgongd av arbeiðsmegi, hevur havt við sær eina óvanliga stóra tilflyting, sum hevur lagt stórt trýst á bústaðarmarknaðin og eisini á stóran part av føroyska undirstøðukervinum, sum t.d. dagstovnar, skúlar og heilsutænastur.

Ábendingar eru tó um, at stóri eftirspurningurin eftir arbeiðsmegi kann hasa av komandi árini. Hall er nú í landskassanum og eisini í kommunala geiranum samanlagt. Landsstýrið hevur lagt fram eitt fíggjarlógaruppskot, sum má sigast at tálma eftirspurninginum, og eisini verður helst talan um minni útreiðsluvøkstur í kommunala geiranum komandi árini. Lækkandi kvotur og lægri laksaprísur fara helst eisini so líðandi at tálma samlaða privata eftirspurninginum.

Men hóast útlit helst eru til nakað lægri eftirspurning komandi árini, so gevur støðan á arbeiðsmarknaðinum tó ikki orsøk til at mæla til beinleiðis lønarafturhald í løtuni.

Men mælt verður tó til ávíst varsemi, tí verður lønarvøksturin støðugt ov høgur, kann tað sum frálíður hava við sær, at lønarstøðið fer upp um framleiðsluvirði hjá pørtum av arbeiðsmegini og tað kann hava við sær, at arbeiðsloysi og fráflyting kemur í búskapin, tí so verður eftirspurningurin minni enn útboðið. Umráðandi er tí at hava eitt ávíst lønarafturhald í góðum tíðum, soleiðis at arbeiðsloysi ikki uppstendur, um niðurgongd kemur í búskapin.

Men við uppskotinum hjá arbeiðsbólkinum kemur produktivitetsvøksturin løntakaranum til góðar so líðandi yvir eitt longri ára mál, og við hesum verður tryggjað, at komandi lønarhækkingarnar er kjølfestar í einari varandi hækking í produktivitetinum, og at talan ikki bara er um fyribils sveiggj, sum fána burtur eftir fáum árum.

**Gjaldsjavnin**

Gjaldsjavnin setur eisini avmarkingar fyri, hvussu høgan lønarvøkstur ein búskapur kann hava sum frálíður. Er lønarvøksturin støðugt ov høgur, hevur tað við sær ein vaksandi innflutning, tí inntøkan hækkar og fólk keypa meira og meira vørur og tænastur úr útlandinum. Hinvegin lækkar útflutningurin, tí kappingarførið í útflutningsvinnuni versnar vegna hækkandi innlendskt kostnaðarstøði. Langtíðar lønarvøksturin kann tí ikki verða hægri, enn gjaldsjavnin tolir. Annars verður úrslitið ein vaksandi uttanlandsskuld við vaksandi rentukostnað mótvegis útlandinum.

Øktar inntøkur til samfelagið sum ikki stava frá øktum produktiviteti í framleiðsluni, men príshækkingum á útflutningsvørum, vilja síggjast aftur í gjaldsjavnanum. Hesar síggjast hinvegin ikki aftur í produktivitetsvøkstrinum sum bólkurin mælir til at brúka til at seta lønarkarmin eftir. Tí hevur tað týdning eisini at hyggja eftir gjaldsjavnanum.

Føroyar hava havt ein søguliga stór gjaldsjavnaavlop seinastu 15 árini (mynd 5). Orsøkin er serliga stóru inntøkurnar í alivinnuni og pelagisku vinnuni, sum hava økt munandi um føroysku uppsparingina mótvegis umheiminum. Gjaldsjavnin er tó versnaður nakað seinastu 10 árini, millum annað vegna støðugt lækkandi avlop í almenna geiranum, men er framvegis sera góður, við avlopum samsvarandi við umleið 5% av BTÚ. Avlopið stavar nú fult og heilt frá privatari uppsparing hjá vinnuni og húsarhaldunum, tí almenni geirin samanlagt vísir nú eitt undirskot.

Roknast má tó við, at fallandi laksaprísur í ár og minkandi kvotur nøkur ár frameftir fara at minka um gjaldsjavnaavlopið. Men hinvegin, so hava íløgurnar verið óvanliga stórar seinastu árini, umleið 30% av BTÚ, og tað fer ivaleyst at betra gjaldsjavnan munandi, tá íløgurnar koma niður á eitt meira vanligt støði. Eisini fer tað at betra gjaldsjavnan um tað almenna komandi árini fer undir at tryggja langtíðar haldføri í almenna búskapinum.

Samanumtikið kann tí sigast, at gjaldsjavnagongdin gevur ikki orsøk til at mæla til lønarafturhald í løtuni, og verður lønarvøksturin frameftir ásettur í mun til langtíðar produktivitetsøkingina, eins og arbeiðsbólkurin mælir til, so verður talan um ein lønarvøkstur, sum ikki skuldi nervað kappingarførið í føroyska búskapinum.

Tinganes, hin 6. november 2025

**Fylgiskjøl:**

## Mynd 1: Árligi produktivitetsvøksturin




*Mynd 1: Produktivitetur verður her nágreinaður sum BTÚ í føstum prísum býtt við talið av arbeiðsvirknum (15-74 ár).*

## Mynd 2: Árligi prísvøksturin




*Mynd 2: Prísvøkstur eru lutfalsligu broytingarnar í brúkaraprístalinum hjá Hagstovuni.*

**Mynd 3: Arbeiðsleys í prosentum, trendur**




*Mynd 3: Fulltíðararbeiðsleys í prosentum av arbeiðsmegini.*

**Mynd 4: Gongdin í realløn og produktiviteti 2008-2026 við uppskoti til lønarkarm – Indeks 2008=100**




*Mynd 4: Gongdin í realløn er lønargongdin, frároknað vøkstur í brúkaraprístalinum.*

**Mynd 5: Gjaldsjavni í mun til BTÚ**




**Mynd 6: Starvsfólkatal í føroyska búskapinum, trendur**



**Mynd 7: Tal av fólki, ið fylla 67 ár í árinum**




**Mynd 8: Tal av starvsfólki uttan bústaðartilknýti**

